

*Trý javnaðarfólk í døpurhuga. Tá tingið var sett leygardagin vóru tingfólk javnaðarfloksins sannførd um, at tey skuldu í andstøðu*
*Mynd: Ólavur Frederiksen*

uttan at gera av, hvør skipan kemur ístaðin. Vinnan og borgarin skulu hava greitt at vita, hvat hendir við loyvum og fiskirættindum frameftir.

Samgongan er samd um, at skipanin skal verða endurskoðað eftir hesum meginreglum:

- Brúksrættindini til tilfeingið skulu umsitast og umsetast gjøgnum ein almennan fiskirættindamarknað.
- Skipanin skal vera liberal. Fiskivinnan skal skipast sambært vanligum marknaðar- og kappingartreytum, og politiski myndugleikin skal ikki kunna býta út loyvi, fiskirættindi ella áseta prís fyri tíðaravmarkaðan brúksrætt.
- Skipanin skal vera sjálvregulerandi soleiðis, at vinnan og príslegan sjálv tillagar seg innan karmarnar.
- Skipanin skal vera varandi og tryggja, at føroysk fiskiveiði er burðardygg.
- Møguleikin verður kannaður, at heimaútróður við smábátum ikki verður fevndur av skipanini

Til tess at tryggja støðugleika og tryggleika verður nevnd sett í samráð við allar viðkomandi partar. Nevndin skal gera líðugt uppskot um, hvussu lógin um vinnuligan fiskiskap verður endurskoðað og broytt sambært omanfyri nevndu meginreglum.

Leikluturin og umstøðurnar hjá lívfrøðiligu ráðgevingini verða styrkt. Endurmetingin av veiðitrýstinum verður framd alt fyri eitt, og fiskiveiðieftirlitið verður hert.

*Trygd á sjónum*
Nýggj trygdarmiðstøð verður bygd í Klaksvík.

## Arbeiðsmarknaður

Í almenna starvsfólkapolitikkinum skal størri dentur verða lagdur á starvsfólkamenning og trivnaðarætlanir.

Setanar- og arbeiðsviðurskifti hjá tímaløntum verða tryggjað í nýggjari lóg.

ALS-skipanin verður endurskoðað, m.a. fyri at hækka endurgjaldið og fyri at gera skipanina betri fyri sjómenn, parttíðarsett og tey, sum skulu fáa tilboð um umskúling.

Allir løntakarar, eisini tímalønt, skulu hava lógarfestan rætt til endurgjald í sambandi við fráveru vegna barnsins fyrsta sjúkradag.

Barsilsskipanin verður longd upp í eitt ár, ein partur av tíðini verður settur av til pápan. Miðað verður eftir at gera skipanina smidligari.

Í samráð við partarnar á arbeiðsmarknaðinum verður stig tikið at skipa serligan útbúgvingargrunn, sum í fyrstu syftu skal geva møguleikar at førleikamenna ófaklærd, og síðan eisini aðrar løntakarar.

Fyri at arbeiðið fyri góðum arbeiðsumhvørvi kann verða raðfest hægri, skulu Arbeiðseftirlitið og Skipaeftirlitið verða styrkt.

*Rúmligur arbeiðsmarknaður*
Arbeiðsmarknaðurin skal gerast rúmligari og smidligari við betri skipanum. Virkað skal verða fyri, at almenn arbeiðspláss oman fyri ávísa støddseta fólk í vard størv og skipa arbeiðsumstøður og atkomu so, at tað ber til. Skipað skal verða fyri fyribyrgjandi átøkum, so fólk ikki missa tilknýtið til arbeiðsmarknaðin.

*Javnstøða*
Javnstøðunevndin skal mennast, so hon eisini kann átaka sær arbeiðið at styrkja kvinnuluttøkuna í politikki. Haraftrat skal hon hava møguleikar at útgreina javnstøðuna á arbeiðsmarknaðinum og samfelagnum annars.

*Brúkaramál*
Nýggj lóg um marknaðarføring verður gjørd, og brúkaravernd verður skipað undir eftirliti av brúkaraumboðsmanni, sum m.a. javnan skal kanna prísin á húsarhaldsvørum.

Rættindi og møguleikar hjá brúkarum at kæra í brúkaramálum uttan at skula noyðast undir privat sakarmál, skal verða tryggjað við lóg um brúkarakærunevnd.

Í sambandi við keyp og sølu av bústaðarognskulu rættindi hjá keyparum og seljarum tryggjast við nýggjari lóg um fastognarkeyp, ið m.a. ásetir freistir, iðranarrætt og krav um byggifakligar støðumetingar av ognini.

Gerast skal lóg um meklaravirksemi, ið regulerar húsamekling í sambandi við keyp og sølu av bústaði.

## Samferðsla

*Samferðsluútbyggingar*
Samferðslukervið er útbygt soleiðis, at 85 prosent av borgarum landsins nú eru knýttir at sama veganeti. Samgongan hevur sum mál, at verandi útbyggingarnar halda fram.

Langtíðar løgu- og fíggjarætlan verður gjørd í samráð við sakkunnleikan og í samsvari við búskapar- og fíggjarorku landsins.

Skipað verður so fyri, at farmaflutningurin millum oyggjarnar aftur fæst at virka á nøktandi hátt

Atlit verða tikin til støðu teirra rørslutarnaðu, tá ið nýíløgur/ábøtur í samferðsluskipanini verða gjørdar.

*Fígging av samferðslukervi*
Sett verður nevnd at endurskoða fíggingina av samlaða samferðslukervinum í landinum, so atlit verða tikin til samfelagsbúskap, umhvørvi, ferðslustýring, økismenning og samhaldsfasta fígging.

*Flogvallarviðurskifti*
Farið verður undir at byggja flogvøllin í Vágum út sum skjótast. Kanningar av tørvi og møguleikum fyri nýggjum flogvølli halda fram. Ein møguligur nýggjur flogvøllur verður bygdur har, hann sambært sakkunnleikanum liggur best.

*Talgilt undirstøðukervið*
Møguleikarnir fyri at skipa eitt alment netfelag, sum umfatar alt samskiftiskervið, verða kannaðir. Endamálið er at tryggja, at talgilda undirstøðukervið støðugt verður útbygt og gjørt kappingarført.

## Økismenning

*Økismenning og útoyggjapolitikkur*
Ein miðvísur økismenningar- og útoyggjapolitikkur skal verða rikin. Nýggir almennir stovnar verða skipaðir kring landið, har tað er ráðiligt. Ávísur partur av almennu íløgunum verður nýttur á og til og frá útoyggjunum. Menningarætlan skal verða gjørd fyri hvørja oyggj sær.

Endalig loysn skal verða funnin á trupulleikanum viðvíkjandi orkutørvinum á ávísum útoyggjum

*Vakstrarætlan fyri Suðuroynna*
Vakstrarætlan fyri Suðuroynna verður framd í verki

## Kommunur

Í samráð millum land og kommunur verður ætlan gjørd fyri, nær kommunurnar skulu hava skipað seg sjálvar í skikkaðar eindir, ið kunnu átaka sær fleiri og størri uppgávur og tryggja eitt javnt tænastustøði kring alt landið.

## Umhvørvi og orka

Føroyar skulu taka ábyrgd og ganga á odda í tilfeingisrøkt, so at vit kunnu lata børnum okkara eitt ríkt og livandi umhvørvi.

Miðað verður eftir at flyta Føroyar yvir í ein "reinorkubúskap" so vit taka okkara part av ábyrgdini at minka globala útlátið av $CO_2$.

*Burðardygg framleiðsla*
Krøvini frá keyparum kring heimin um burðardygga og náttúruskynsama framleiðslu og burðardygga tilfeingisrøkt gerast alsamt meira ein treyt fyri útflutningi og samhandli.

Tí verða hesi stig tikin: Orkuráð verður sett at ráðgeva og upplýsa borgarar og vinnu, byggisamtyktir verða gjørdar, ið vegleiða og seta krøv til orkusparing, krøv verða sett um, at ný- og umbygging er orkuvinarlig, eggja verður til verkætlanir við eitt nú "grønum" barnagørðum og skúlum, vinna á sjógvi og landi skulu fylgja fremstu altjóða málum fyri orkunýtslu, varandi orkukeldur, so sum vatn-, vind-, sól-, aldu-, berg- og sjóvarfalsorku, skulu mennast, royndir at menna burðardygga veiðu verða stuðlaðar.

*Umhvørvi*
Nýggj náttúruverndarlóg verður smíðað, lendisskipanir verða gjørdar, ið staðfesta skynsama nýtslu av lendinum, altjóða sáttmálar um umhvørvisvernd, eitt nú um lívfrøðiligt margfeldi og Kyoto verða fylgdir, kemikaliuøkið verður skipað, tryggjað verður, at virki eru umhvørvisgóðkend, revsing fyri dálking verður herd, og menna skipanir, ið fyribyrgja oljudálking stuðlaðar, Føroyar verða virkin luttakari á verðurlagsráðstevnuni í Keypmannahavn 2009, umhvørvis- og avgjaldspolitikkurin verða knýttir saman.